Fólkapensjónin verður strikað

Innan ein mánað væntar Sámal Petur í Grund at leggja eitt uppskot um nýggja pensjónsskipan fyri løgtingið. Núverandi skipan er vorðin ov kostnaðarmikil, soleiðis at tað kann gerast trupult at tryggja vælferðina. Ætlanin er tí, at pensjónirnar í framtíðini skulu ganga uttan um landskassan, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður

EFTIRLØN
Heri á Rógvi

Í rættiliga langa tíð hevur verið arbeitt við einari nýggjari eftirlønarskipan. Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu var eitt ynski um eina eftirlønarskipan staðfest. Arbeitt hevur eisini verið við málinum líka síðani, og loksins tykist eitt uppskot at vera á veg í løgtingið.

Sambært Sámal Peturi í Grund er málið nú komið somikið ávegis, at málið kemur fyri á landsstýrisfundi í dag.

- Tað verður neyðugt at fáa málið fyri løgtingið sum skjótast. Høvdu vit bíða longur við málinum, so hevði tað væntandi ikki verið avklárað í hesum valskeiðinum, sigur Sámal Petur Grund.

Hann skilur væl ábreiðslurnar um, at hetta málið hevur tikið ov langa tíð, men hetta er eitt sera stórt mál, so tað hevur tikið eitt sindur av tíð.

Ætlanin er, at málið nú skal koma fyri á landsstýrisfundi í dag. Ætlanin er síðani at lata málið fara út til hoyringar hjá eitt nú fakfeløgum. Innan ein mánað væntar Sámal Petur í Grund, at løgtingið kann fáa møguleikan at viðgera málið.

Sjálvi syrgja fyri

Sámal Petur í Grund segði fyri kortum fyri Útvarpi Føroya, at fólkapensjónin skuldi avtakast.

- Her verður sipað til, at sjálvt hugtakið fólkapensjón verður avtikið, sigur Sámal Petur í Grund.

Núverandi pensjónsskipanin virkar á tann hátt, at pensjónin verður goldin inn gjøgnum skattin, men her fer ein grundleggjandi broyting at fara fram, um tað altso stendur til Sámal Petur í Grund.

- Ætlanin er, at arbeiðsmarknaðurin sjálvur skal syrgja fyri eftirlønunum. Ætlanin er, at endin skal vera, at øll fara at fáa meira burturúr, sigur Sámal Petur í Grund.

Hóast broytingarnar eru rættiliga grundleggjandi, so sigur landsstýrismaðurin, at tað er í veruleikanum als ikki er talan um nakra stórvegis øðrvísi skipan.

Tey, sum longu fáa fólkapensjón fara eisini framvegis at fáa hesa, men ætlanin er í framtíðini at skipað soleiðis fyri, at landskassan ikki skal syrgja fyri at gjalda eftirlønir.

- Hugskotið er, at tey, sum hanga afturúr, skulu fáa meira, sigur Sámal Petur í Grund.

Ætlanin er, at arbeiðsmarknaðurin sjálvur skal standa fyri at skipa eftirlønirnar. Nøkur minstu krøv verða sett til skipaninar. Landsstýrismaðurin avvísir ikki, at tað almenna fer at skipa fyri grunni fyri tey, ið onga skipan hava áðrenn.

Tikið drúgva tíð

Sámal Petur í Grund skilur sum áður nevnt væl atfinningarnar um, at hetta hevur tikið ov langa tíð.

Ein bólkur hevur í langa tíð arbeitt við málinum, og nú metir landsstýrismaðurin, at málið er búgvið til at fáa eina politiska viðgerð í løgtinginum.

- Vælferðartænasturnar kunnu gerast so dýrar, at tað fer at ganga útyvir skipanina, sigur Sámal Petur Grund.

Landsstýrismaðurin vísir á, at tað er alneyðugt, at pensjónistarnir kunnu vera tryggir líkamikið um tað er góðar ella ringar tíðir fíggjarliga.

Gjaldshátturin kann variera í nýggju skipanini, sum nú bíðar eftir viðgerðina frá fyrst samgonguni og síðani løgtinginum. Landsstýrismaðurin vísir aftur, at hetta skal hava nakað komandi samráðingarnar um tey ríkisrættarligu viðurskiftini at gera. Sámal Petur í Grund sær gjarna eina breiða semju, hóast tað tykist sum um, at samgonguflokkarnir hála hvør sín veg í hesum málinum.

Finnur Helmsdal, Tjóðveldisflokkurin:

– Arbeiðshátturin verður størsta forðingin

Finnur Helmsdal sigur at samgonguflokkarnir einki hava fingið at vita um arbeiði við nýggju pensjónsskipanini. Tjóðveldisflokkurin mælir til at gera eina samhaldsfastafólkapensjón, sigur Finnur Helmsdal

EFTIRLØNIR
Heri á Rógvi

Finnur Helmsdal, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin, heldur einki um arbeiðsleistin hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum. Heldur ikki undanfarni landsstýrismaður fær eitt gott skoðsmál frá løgtingsmanninum.

- Vit hava einki fingið at vita um nýggju pensjónsskipanina. Arbeiðshátturin verður størsta forðingin hjá landsstýrismanninum at fáa hetta uppskotið ígjøgnum, sigur Finnur Helmsdal.

Løgtingsmaðurin sigur, at Tjóðveldisflokkurin undir ongum umstøðum kann taka undir við fólkatryggingar prinsippið hjá Fólkaflokkinum. Hann heldur, at ákærurnar um, at Tjóðveldis verður drignir við hárinum av Fólkaflokkinum í tílíkum málum vera heilt burturvið.

Finnur Helmsdal vísir á, at tað er framvegis ein stórur partur av arbeiðsfólkinum, sum onga eftirlønarskipan hevur.

- Vit taka undir við, at arbeiðarafeløgini fáa møguleikan at skipa eina eftirlønarskipan eftir egnum ynski. Tað grundleggjandi hjá okkum er tó, at samhaldsfasta prinsippið framvegis skal galda, sigur Finnur Helmsdal.

Tjóðveldisflokkurin mælir til at gera eina samhaldsfastafólkapensjón, har arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar skulu fíggja skipanina við inngjøldum. Tey lítlu skulu fáa meira burturúr samhaldsfastanum enn tey størru.

- Øllum føroyingum skal vera tryggjað eina hægri gjøgnum skipanina við samhaldsfastupensjónini, sigur Finnur Helmsdal.

Kristian Magnussen, Javnaðarflokkurin:

– Solidariteturin hvørvur

Kristian Magnussen, tingmaður fyri javnaðarflokkin, heldur, at uppskotið um at umleggja pensjónirnar í Føroyum er púrasta burturvið. Endin kann vera, at allur solidariteturin hvørvur, sigur Kristian Magnussen



EFTIRLØNIR
Heri á Rógvi

Javnaðarflokkurin vil fegin varðveita virkandi skipan. Hetta slær Kristian Magnussen fæst, tá Sosialurin bað hann um eina viðmerking til nýggju pensjónsskipanina. Kristian Magnussen sigur, at tað er beinleiðis vandi fyri, at solidariteturin í samfelagnum hvørvur, um eitt tílík uppskot, sum Sámal Petur í Grund tosar um, verður til veruleika.

- Teir breiðastu herðarnir eiga at bera tí tungastu byrðuna, og vit síggja fegnir, at ein kombinatión av samhaldsfasta og fólkapensjón verður til veruleika, sigur Kristian Magnussen.

Javnaðarflokkurin kann sambært Kristiani Magnussen gott taka undir við, at tey, sum hava ráð at gera sær dælt av privatum eftirlønarskipanum, gera hetta, men hetta skal ikki hava nakað samband við landskassan.

Kristian Magnussen sær somuleiðis aðrar stórar vansar við einari tílíkari skipan, sum Sámal Petur í Grund leggur upp til. Hann vísir á, at hetta lættliga kann enda við undirskotið á fíggjarlógini, nú yvirskotið er so mikið "lítið". Eisini vísir hann á vandan, at hetta kann enda við einum partabrævaspælið, har vanligi lønmóttakarin verður statistur.

Kristian Magnussen vísir á, at tað kann hugsast, at Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin kunnu kundu funnu eitt felagsstev, tá hesar flokkar hava sýnt felagseyðkenni innan pensjónsøki.

Vinnarin síðstu seks árini er nú koppaður

Tað var stórur spenningur á veðrasýningini í Hvalba leygardagin, tí hesuferð høvdu menn gjørt seg út at taka kappingina upp við mannin, sum nú hevur vunnið í seks ár á rað

SEYÐAHALD
Áki Bertholdsen

– Hesuferð eydnaðist tað Kristini Jacobsen at leggja Hermund Hentze. Í seks ár á rað hevur Hermund átt tyngsta veðrin í Hvalba. Men hesuferð vigaði tann hjá Kristini trý kilo meiri

Veðrarnir í Hvalba eru betri í ár enn teir vóru í fjør.

Tað kundi nokk so skjótt staðfestast á veðrasýningini, sum var í Hvalba leygardagin.

Hvalbingar hava nú í nøkur ár skipað fyri veðrasýning um heystið og hesuferð høvdu menn bjóðað 43 veðrar fram.

Tað er áleið talið sum plagdi vera. hóast tað bert er ein lítil brotpartur av teimum veðrum, sum eru í sóknini, tí tilsamans munnu einir 600 veðrar verða í Hvalba og í Sandvík, sum eru báðar bygdirnar í Hvalbiar Sókn.

Eliesar Poulsen, sum er ein av stigtakarunum til veðrasýningina, sigur, at yvirhøvur heldur hann, at veðrarnir í ár eru betri enn teir vóru í fjør.

Í fjør var tað ongin veturgamal veðrur, sum fekk 1. virðisløn, men í ár vóru teir seks.

Tað er ilt at siga, hvussu hetta ber til.

– Árini eru altíð ójøvn, men yvirhøvur má sigast, at síðani vit fóru undir veðrasýningarnar, er seyðurin sum heild blivin væl betri enn hann hevur verið, sigur hann.

Hann sigur, at tað er týðiligt, at menn eru farnir at gera sær størri ómak, tá ið teir gera brundar fyri at fáa so góðan seyð sum gjørligt.

Og tá ið hugsað verður um góðan seyð, verður ikki tosað um tyngd.

Tá ið veðrarnir á sýningini verða dømdir, verður heldur hugt eftir, hvussu teir síggja út, hvussu beinini eru, ullin, o.,s.fr. Sostatt snýr tað seg um at hava tann vakrasta veðrin, heldur enn tann tyngsta.

Kortini verður eitt serligt steyp eisini latið fyri tann tyngsta veturgamla veðrin.

Tá ið steypini vórðu handað, segði tann eini dómarin, Petur Karl av Rana á Tvøroyri, at síðani ta fyrstu sýningina, er støðið alsamt hækkað og hann vónaði ikki, at veðrarnir, sum fingu virðisløn leygardagin, vórðu dripnir, fyrrenn teir -sum hann tók til- "høvdu gjørt sína skyldu" sum brundar.

Hinir dómararnir vóru Frits Poulsen úr Sumba og Óli í Hjøllum úr Porkeri.

Koppaður

Størsti spenningurin á sýningini var, hvør ið mundi hava tann tyngsta veturgamla veðrin.

Hetta er sjeynda ferðin, at kappast eisini verður um tann tyngsta veðrin.

Øll hini árini er tað sami maður, Hermund Hentze, ið hevur vunnið við steypið, og hann hevur sostatt vunnið tað seks ár upp í slag.

Men í ár ljóðaði, at menn rættiliga høvdu gjørt seg út uppá at taka kappingina upp við Hermund Hentze og at tað vóru nakrir, sum høvdu gjørt serliga væl við onkran úrvalsveðr fyri at koppa hann av trúnuni.

Og tað eydnaðist, men tað var eisini akkurát.

Tá í allir veðrar vóru vigaðir, gjørdust greitt, at tann tyngsta veturgamla veðrin átti Kristin Jacobsen, hann vigaði 102 kilo.

Hetta er eitt lamb, hann fekk úr Funningi í fjør.

Men Hermund Hentze var beint í hølunum á honum, tí hann hevði ein veðr, sum vigaði 99 kilo, so tað vóru snøgg trý kilo á muni.

Hinvegin var veðrurin hjá Hermundi betri bygdur enn tann hjá Kristini, so teir, sum hava skil fyri seyði, halda, verða teir flettir, skal tað ikki vera langt frá, at tann hjá Hermundi fer at viga meiri.

Tann tyngsti veðrurin hjá Kristini var 93 sentimetrar høgur, 106 sentimetrar um bringina og mjóryggurin var 21 sentimetrar.

Tann næsttyngsti hjá Hermundi var 90 sentimetrar høgur, 111 sentimetrar um bringuna og mjóryggurin var 22 sentimetrar.

Gamlir kenningar

Annars vóru tað fyri ein stóran part gamlir kenningar frá undanfarnu veðrasýningum, sum fingu steypini fyri teir vakrastu veðrarnar.

Veðrarnir vórðu býttir sundur í tveir bólkar, teir veturgomlu fyri seg og teir eldru fyri seg.

Vakrasta veðrin av teimum, sum vóru tvey ár og eldri, átti Vilmund Michelsen. Hetta var ein trý ára gamal veðrur, sum vigaði 104 kilo, hann var 88 sentimetrar høgur, 113 um bringina og mjóryggurin var 23 sentimetrar.

Sami Vilmund Michelsen átti eisini tann næstvakrasta veðrin í hesum bólkinum. Hesin veðrurin var eisini trý ára gamal, hann vigaði 93 kilo, hann var 86 sentimetrar høgur, 119 um bringuna og mjóryggurin var 23 sentimetrar. Triðvakrasta átti Eliesar Poulsen. Hansara veðrur er fýra ára gamal, hann vigaði 99 kilo, hann var 87 høgur, 113 um bringuna og 24 um mjóryggin.

Í bólkinum fyri teir veturgomlu veðrarnar, átti Eliesar Poulsen tann vakrasta, hann vigaði 85 kilo, var 84 høgur, 107 um bringuna og 23 um mjóryggin.

Næstvakrasta átti Pole Skaalum, hansara veðrur vigaði 81 kilo, hann var 84 sentimetrar høgur, 104 um bringuna og mjóryggurin var 21 sentimetrar.

Triðvakrasti, veturgamli veðrurin, var tann áðurnevndi tyngsti veðrurin hjá Kristini Jacobsen.

Hesir fýra eiga vakrastu seyðirnar í Hvalba. Frá vinstru eru teir Pole Skaalum, Eliesar Poulsen, Kristin Jacobsen og Vilmund Michelsen. Teir tríggir, Eliesar, Vilmund og Kristin fingu tvær virðislønir í part

Fleiri seyðasýningar í Suðuroy

Í næstu framtíð verða fleiri seyðasýninar ymsastaðni í Suðuroynni. Her er talan um brundlomb.

Teir, sum skipað fyri seyðasýningunum siga, at ætlanin er at hava allar sýningarnar í somu viku.

Tann eini av stigtakarunum, Eliesar Poulsen, sigur, at Ætlanin er at leggja til brots fríggjakvøldið 19. oktober.

Tað einasta, sum er greitt, er, at sýningarnar í Hvalba og í Porkeri verða leygardagar, tí har eru so nógv lomb. Sýningin í Hvalba verður sostatt leygardagin 20. oktober og tann í Porkeri leygardagin eftir, tann 27. oktober.

Annars er ætlanin at hava sýningarnar fyri lomb á Tvøroyri og í Øravík, í Hovi, í Sumba, í Vági hinar dagarnar í vikuni.

Sýningarnar enda við eini oyggjarsýning, sum verður í Hvalba leygardagin 10. november. Á teirri sýningini verða øll lombini, sum hava verið tey bestu á teimum ymsu sýningunum kring oynna.

Á hesari sýningini er ætlanin at hava sýnsmenn norðaneftir.

Á hesum sýniunum eru tað tey vakrastu lombini, sum fáa virðisløn, ikki tey størstu. Eliesar Poulsen sigur, at seyðasýningarnar hava havt stóran týdning fyri seyðahaldið, tí nú gera menn sær nógv størri ómak, tá ið teir velja brundar fyri at fáa so gott slag sum gjørligt, eitt nú verður hugt eftir ullini, beinunum, hornunum og eftir, hvussu lambið ber seg yvirhøvur.